## Nýggj samgonga

Grønlendingar fingu í gjár nýtt landstýri. Tað hendi, eftir at Siumut og Atassut fyrrakvøldið samdust um at skipa samgongu.

Samgongan millum Siumut og IA slitnaði fyrr í vikuni, tá Hans Enoksen, landsstýrisformaður gjørdi av at kvetta sambandið við IA. Tað hendi eftir hvassar ábreiðslur frá IA, sum ikki vildi góðtaka, at Siumut hevði sett nakrar av sínum limum í leiðandi størv hjá heimastýrinum.

Nýggja samgongan sigur, at hon ætlar sær at reka ein virknan politikk næstu fýra árini. Tann seinasta samgongan millum Siumut og Atassut slitnaði í oktober í fjør, eftir at ein grannskoðarafrágreiðing hevði staðfest, at tveir landsstýrismenn høvdu nýtt 59 milliónir krónur meiri enn játtanina. Men hesaferð fer samstarvið at halda, lovaði formaðurin í Atassut, Augusta Salling, í gjár.

## Tikin í USA

Svenska kvinnan, sum mitt í vikuni burturflutti sítt egna barn úr einum barnagarði í býnum Vesterås, varð tikin í USA hóskvøldið.

Svenska løgreglan bað løgregluna í øllum londum hava eygað við kvinnuni, tí løgreglan visti ikki, um hon kundi vera farin úr Svøríki. Tað vísti seg, at nøkur starvsfólk í Gardermoen-floghavnini í Oslo høvdu bitið merki í kvinnuna og barnið, tá tey vóru farin við flogfari úr Oslo til New York. Amerikanska løgreglan varð alt fyri eitt kunnað um málið, og í floghavnini í New York varð kvinnan tikin.

Tann 24 ára gamlan kvinnan tók í 1999 lívið av einum barni, sum hon júst hevði átt. Frammanundan átti hon eina fimm ára gamla gentu, sum hon burturflutti úr barnagarðinum og tók við sær til USA.

## Amerikanarar eru vitleysir

Kendi bretski rithøvundurin John le Carré skrivar í einari bersøgnari grein í blaðnum The Times, at amerikanarar eru vitleysir, og hann leggur amerikansku fjølmiðlarnar undir at leggja seg á knæ fyri Hvítu Húsunum.

Sambært John le Carré skrivar, at tað, sum amerikanska stjórnin hevur gjørt síðani yvirgangsatsóknirnar tann 11. september í 2001, er verri enn tað, sum hendi í tíðini hjá McCarthy, verri enn álopið í Svínavíkini á Kuba og nógv verri og vandameiri enn kríggið í Vietnam.

- Sum undir McCarthy verða øll tey rættindi, sum heimurin hevur misunt USA, traðkað undir hæl, skrivar tann 71 árta gamli rithøvundurin, sum sjálvur hevur eina fortíð sum bretskur njósnari. Hann vil vera við, at Bush-stjórnin nýtir álopini á New York og Washington sum skálkaskjól, og at forsetin og menn hansara í veruleikanum longu høvdu sett sær fyri at fara í kríggj, áðrenn yvirgangsmenninir lupu á.

## van Gogh má kannast

Tjóðlistasavnið í Oslo hevur fingið eitt heldur løgið mál at dragast við.

Síðani 1910 hevur ein sjálvsmynd hjá tí kenda van Gogh hingið á savninum, men fyri nøkrum døgum síðani kom fram, at málningurin eftir øllum at døma er ein eftirgerð. Fleiri norskir serfrøðingar siga, at tað er neyðugt at kanna málningin, tí tað er umráðandi at fáa staðfest, um van Gogh hevur málað hann, ella um talan er um eina eftirgerð. Summir serfrøðingar vísa á, at kendi norski listamaðurin Edvard Munch segði seg ivast í, at van Gogh hevði málað málningin.

Á tí stóra van Gogh-savninum í Amsterdam vilja tey ikki gera nakra viðmerking til tey sjáldsomu tíðindini úr Oslo. Savnið sigur tó, at har eru tey sinnað at kanna málningin, um norska tjóðarsavnið biður tey gera tað.

# 67 prosent fyri norskum ES-limaskapi

**Undirtøkan fyri norskum limaskapi í ES veksur skjótt, og politikarar halda, at fólkið hevur tikið støðu**

NOREG OG ES
*Árni Joensen*

Seinastu tíðina hava meiningakanningar í Noregi givið eina týðiliga ábending um, at alt fleiri og fleiri norðmenn halda, at landið eigur at fara upp í ES.

Tann seinasta kanningin, sum varð almannakunngjørd í gjár, vísti, at 67 prosent av teimum spurdu taka undir við at fara upp í ES, meðan 33 prosent eru ímóti.

Í einari kanning fyri einum mánað síðani svaraðu 58 prosent ja, og tá fólkaatkvøða var um spurningin í 1994, tóku 47 prosent undir við limaskapinum. Tann nýggja kanningin vísir, at meiri enn 30 prosent av teimum, sum atkvøddu nei fyri níggju árum síðani, høvdu atkvøtt ja nú.

Jan Petersen, uttanríkisráðharri heldur, at fólk hava fingið eina aðra uppfatan av ES, og hann ivast ikki í, at tann nýggja kanningin gevur eina rætta mynd av støðuni hjá fólkinum. Tað merkir tó ikki, at stjórnin fer at søkja um limaskap, tí tað hava flokkarnir í samgonguni fyrr avtalað.

# Aftur á bumbustaðið

**Tveir menn, sum eru skuldsettir fyri at hava verið uppi í bumbuatsóknini á Bali, skulu nú greiða løgregluni frá, hvussu teir framdu atsóknina**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*



*Indonesiska løgreglan heldur, at tað var Ali Imron sum setti vøruvognin við spreingievninum uttan fyri matstovuna á Bali. Á myndini kemur Ali Imron aftur til Bali*

*Mynd: Reuters*

Tveir menn, sum indonesiska løgreglan hevur tikið og skuldsett fyri at hava verið uppi í teirri ógvusligu bumbuatsóknini á frítíðaroynni Bali í oktober í fjør, komu í gjár aftur til Bali. Atsóknin kostaði næstan 200 mannalív.

Báðir menninir hava viðgingið, at teir høvdu við atsóknina at gera, men tað er ikki greitt, hvønn lut teir høvdu í henni. Kortini vil løgreglan vera við, at annar maðurin, Ali Imron, koyrdi tann lítla vøruvognin, sum fór í luftina uttan fyri eina matstovu á Bali tann 12. oktober. Løgreglan heldur, at tað var hann, sum setti vøruvognin uttan fyri matstovuna.

Fyrrakvøldið vórðu Ali Imron og hin skuldsetti maðurin fluttir til Bali, har løgreglan ætlar at fáa teir at vísa, hvussu álopið varð lagt til rættis.

# Kvinnurnar offur fyri krígsbrotsverkum

**Fleiri túsund kvinnur og gentur vórðu neyðtiknar og illa viðfarnar í tí tíggju ára langa borgarakrígnum í Sierra Leone**

KRÍGSBROTSVERK
*Árni Joensen*

- Uppreistrarmenninir neyðtóku kvinnur, sum vóru við barn og kvinnur, sum góvu bróst, og teir noyddu menninar at hyggja at, meðan døtur teirra vórðu neyðtiknar. Ungir dreingir, sum vóru millum uppreistrarmenninar, neyðtóku kvinnur, sum vóru so gamlar, at tær kundu verið ommur teirra.

Soleiðis stendur at lesa í einari nýggjari frágreiðing, sum mannarættindafelagsskapurin Huam Rights Watch hevur skrivað. Frágreiðingin ber heitið "Grætur tú, drepa vit teg".

Tann viðurkendi felagsskapurin leggur fram ein hóp av próvtilfari um kynslig krígsbrotsverk í Sierra Leone, og meiri enn 300 tilburðir verða neyvt umrøddir. Í hesum førunum hava fólk hjá Human Rights Watch tosað við tey, sum vóru offur fyri harðskapinum, og onnur, sum vóru hjástødd, men felagsskapurin ger vart við, at tað finnast mong dømi, sum ongantíð eru vorðin skrásett.

- Kynsligur harðskapur er framvegis tað fjalda krígsbrotsverkið í Sierra Leone, sigur Human Rioghts Watch.

Frágreiðingin er óhugnaligur lesnaður. Fleiri túsund kvinnur og gentur vórðu rændar og burturfluttar og nýttar sum kynsligir trælir hjá uppreistrarmonnunum. Fleiri túsund teirra vórðu neyðtiknar, og hópneyðtøkur vóru vanligar. Ágangurin var serliga harður ímóti teimum ungu kvinnunum, men tilkomnar og eldri kvinnur vórðu ikki spardar.

Human Rights Watch dylir ikki fyri, at hermenn hjá stjórnarherinum framdu eisini ágang ímóti kvinnum, og frágreiðingarnar benda eisini á, at einstakir hermenn úr tí friðarvarðveitandi herdeildini hjá ST gjørdu seg inn á kvinnur. Men eingin ivi er um, at uppreistrarmenninir stóðu fyri nógv tí største partinum av brotsverkunum.

Higartil er eingin tikin ella skuldsettur fyri tey kynsligu brotsverkini í borgarakrígnum í Sierra Leone, sum vardi frá 1991 til 2001.



# Tórsgøta kann gerast mentunargøta

**Hósdagin handaði Rógvi á Rógvu Tórshavnar býrað undirskriftir og brøv, har fólk heitti á býráðsmyndugleikarnar um at útvega nýtt tónleikahús. 20 ár eru liðin síðani Perlan varð tikin niður, men enn hevur býráðið ikki fylgt síni egnu samtykt at byggja nýtt. Men borgarstjórin í Havn er positivur, hóast hann ikki vil lova ov nógv**

TÓNLEIKAHÚS
*Theodor E. D. Olsen*

Undirskriftir, brøv, yrkingar, rím og ævintýr fyri nýggj tónleikahús. Tað visti Sosialurin í gjár at siga, at Rógvi á Rógvu hevði savnað inn frá fleiri enn 150 fólkum, og hósdagin læt hann allar hesar áheitanirnar í bæði bundnum og óbundnum máli inn til Tórshavnar býrað.

Ætlanin hjá Rógva og hansara kreativu brævskrivarum er nevniliga at útvega føroyskum tónleikarum eini hús í høvuðsstaðnum, sum bert skulu vera til tónleikin, og ikki til dans, café ella matstovuvirksemi.

Jan Christiansen úr Fólkaflokkinum, sum er borgarstjóri í Havn, hevur enn ikki sæð brøvini við áheitanum um eitt tónleikahús, men hann heldur, at hugskotið hjá Rógva á Rógva um hendan heldur óvanliga hátt at siga sína meining er gott, tí hetta skriva yrkingar og brøv sigur meira, enn vanligar undirskriftir. – Tá síggja fólk út til at meina tað, sigur býráðsformaðurin.

### Trivnaður nógv at siga

Jan Christiansen gevur Rógva á Rógvu rætt í, at tørvur er á einum tónleikahúsi í Havn. Hann heldur at havnarfólk kunnu læra av fuglfirðingum, sum herfyri bygdu Mentunarhúsið, ið Jan Christiansen sigur vera veldiga flott, sum hann málber seg.

Borgarstjórin í Havn heldur, at í okkara samtíð hevur trivnaður nógv at siga, ja, kanska meira enn nakrantíð fyri ein bý.

Í blaðnum í gjár skrivar Sosialurin, at tað í ár eru 20 ár síðani Perlan varð tikin niður, og Rógvi á Rógvu, sum spældi trummur í Plúmm segði, at hetta var ein sorgardagur fyri teir í teir í hesum so navnframa bólki. Perlan var nevniliga spælistaðið og pallur hjá tí tá blómandi tónleikalívinum í Havn.

Til hetta sigur Jan Christiansen, sum tó ikki sat í býraðnum tá, at hann minnist væl Perluna, ið hann kallar sjarmerandi, hóast hon var í ringum standi, og í dag kann ein undrast á, at ein so høgur bygningur fekk staðið á einum sovorðnum frímerki, sum borgarstjórin tekur til. Hann leggur afturat, at tað var ein býraðssamtykt at taka Perluna niður, men hetta var treytað av, at eitt nýtt hús varð bygt ístaðin. Hetta lyftið hildu býráðspolitikararnir í Havn tó ongantíð, og seinna helvtin av samtyktini, ið innibar at byggja nýggj hús til tónleikin, bleiv ongantíð førd út í lívið.

### Miðbýurin er hjartað í Havnini

Jan Christiansen sigur kortini, at hann heldur, at millum manna er ivi um, um júst økið, har Perlan stóð, er tað rætta, tí tað er ein spurningur um eina størri ætlan fyri bygging í økinum, og ein tílík er ikki gjørd.

– Vit hava ikki diskuterað hatta enn, tí vit hava eisini onnur mál, sum skulu loysast, m.a. støð - eitt nú til dans - til tey heilt ungu. Men í dag veita vit stuðul til mentunarlig tiltøk, so kanska okkurt av tí kundi verið brúkt til endamálið, sigur Jan Christiansen, sum tó leggur dent á, at heldur ikki tað er viðgjørt í Tórshavnar býráði enn.

Spurdur, um hann gevur Terja Rasmussen rætt, tá tónleikarin í Breddanum í SvF herfyri segði, at ein og hvør høvuðsstaður við virðing fyri sær sjálvum átti at átt eitt tónleikahús, sigur borgarstjórin, at tað er helst rætt. Hann nevnir eisini tann paradoksala paralellin hjá Rógva á Rógvu í Sosialinum í gjár, har hann segði, at Havnin hevur ein musikkskúla, men ongan pall til tónleikarar, og fleiri framsýningarstøð til myndlistina, men ongan listaskúla.

Jan Christiansen kann tó avdúka, at undirskriftirnar og brøvini frá stigtakaranum, Rógva á Rógvu verða viðgjørd við vælvild, men hann legur dent á, at eitt eru vakrar ætlanir, og eitt annað er at gera tær til veruleika, tí eitt slíkt skal t.d. ikki vera til ampa fyri grannar o.s.fr. Borgarstjórin heldur tó, at eitt slíkt hús átti at ligið í miðbýnum, tí sum hann málber seg úr myndum frá medisinverðini, so riggar einki, um hjartað ikki riggar. Og hjartað í Havn er miðbýurin. Hann heldur eisini, at vit skulu verða varin við at taka bygningar niður, og einki seta ístaðin, tí hóast opin pláss kunnu vera góð, so er tað ikki so ofta, at vit kunnu ganga hvítklødd í Føroyum, og eingin miðbýur kann liva av bara grækarismessu, 1. mai og ólavsøku, sum borgarstjórin tekur til.

Annars hevur Tórshavnar býrað arbeitt við eini ætlan at gera eina musikkcafé, og tí er hugsandi at hesar ætlanir verða tiknar fram aftur, man tað liggur onkustaðni í framtíðini, sigur ein fyrivarin Jan Christiansen, sum tó avdúkar, at tankar eisini hava verið frammi um, at gera Tórsgøtu til mentunargøtu, og Gríma er jú longu í gøtuni frammanundan. – Men vit skulu vera vera varin við gomlum bygningum, og onkuntíð er langt millum tanka og gerð, sigur Jan Christiansen at enda.

## Artic Images



*Í dag letur upp fotoframsýning hjá íslendingunum Ara Trausta Guðmundssyni og Ragnar Th. Sigurðsson, »Arctic Images« Framsýningin, sum hevur undirheitið "Vestan sól - norðan mána" fevnir um 45 litmyndir, sum sýndar verða í Dansistovuni í Norðurlandahúsinum. Framsýningin viðgerð eyðkenni og frábrigdi í Útnorði. Undir hvørjari rammu er eitt evni við trimum myndum, ein frá hvørjum av útnorðurlondunum, Føroyum, Grønlandi og Íslandi.*

Óla Jákup úr Dimun, formaður:

# Útoyggjafelagið viðmælir kanning

**• Vit hava samhaldsfastar skipanir á so nógvum økjum í samfelagnum, og fyri mær at síggja er tað bara mennandi fyri samfelagið, um vit eisini hava eina samhaldsfasta skipan á samferðsluøkinum, sigur Óla Jákup úr Dímun, form. í Útoyggjafelagnum.**

ØKISMENNING
*Tummas í Dali*



Útoyggjafelagið viðmælir, at skipanin av okkara samferðslu verður kannað við tí endamáli, at skipanin verður gjørd meira samhaldsføst.

Óla Jákup úr Dímun sigur, at nevndin í Útoyggjafelagnum hevur havt fund í síðstu viku, har m.a. fráboðanin frá Marjusi Dam um leggja uppkot fyri tingið at endurskoða alla skipanina av samferðsluni varð umrøtt.

Úrslitið av umrøðuni var, at felagið mælir til eina kanning.

- Ein góð, álítandi og ikki ov kostnaðarmikil samferðsla er ein av fyritreytunum fyri at varðveita búplássini í útoyggjum og øðrum útjaðaraøkjum, sigur Óla Jákup úr Dímun.

### Samferðsla og samskifti

– Umframt eina so samhaldsfasta skipan sum gjørligt, mæli eg til, at møguleikin eisini verður kannaður fyri at fáa økt um títtleikan av ferðsluni til og frá útjaðaranum hjá tyrluni og strandfaraskipum landsins, sigur Óla Jákup úr Dímun.

– Ein grundleggjandi endurskoðan av hesum viðurskiftum er í fullum samsvari við tilmælini í Útoyggjaálitinum, sum undanfarna samgonga fekk til vega.

– Í mongum førum átti at verið bøtt um samferðslutíttleikan. Í mínum egna føri eg tað so, at eg ongan dag í vikuni sleppi úr og í aftur oynna sama dag.

Óla Jákup úr Dímun mælir eisini til, at ikki bert samferðslustøðan, men eisini samskiftisstøðan í útoyggjum verður munandi bøtt. Tað er nevniliga m.a. so, at í fleiri støðum í útoyggjum ber illa til at samskifta um Gsm-fartelefonir.

### Fleiri møguleikar

Óla Jákup úr Dímun sigur, at ein kanning av samferðslukervinum møguliga kundi havt sum mál at víst á fleiri samhaldsfastar møguleikar, sum løgtingið síðan viðgjørdi og tók støðu til.

– Tað er á so nógvum økjum, at vit hava samhaldsfastar skipanir, sum fólk í útjaðaranum gjalda til eins og onnur, men sum tey ikki í sama mát fáa gagn av. Vit kunnu m.a. nevna barnagarðsøkið.

– So tað hevði onki løgið verið í tí, at samferðslan til útoyggjar varð skipað meira samhaldsføst.

– Vit mugu jú minnast til, at fólk í útoyggj regluliga eru noydd at ferðast til miðstaðarøkið, m.a. tí at landsstovnarnir eru har.

– Nú flestu bygdir hava fingið fast samband við miðstaðarøkið, hevði tað tókst mær løgið, um ikki løgtingsmenn fóru at hugsa nógv meira um møguleikarnar fyri at bøta um samferðsluna til útjaðaraøkini, sigur Óla Jákup úr Dímun.

### Eitt sindur ørkymlaður

Óla Jákup úr Dímun sigur, at tað sýntist so ljóst hjá útjaðaranum, tá ið samgongan varð skipað á várið 98 við økismenningini og útoyggjapolitikki á dagsskránni, men at hann í dag er meira ørkymlaður fyri framtíð útoyggja.

– Myndugleikarnir hava fingið eitt gott útoyggjaálit at byggja sín politikk á til frama fyri landið, men eg haldi, at higartil er ov lítið er komið av skafti í tráð við álitið, sigur Óla Jákup úr Dímun.

### Vinnuhús á útoyggjum

Í Útoyggjaálitinum verður støðan hjá útoyggjunum sum heild lýst, og mælt verður til at seta ymisk ítøkilig tiltøk í verk.

– Nøkur av hesum tiltøkum kunnu setast í verk beinanvegin, men onnur krevja longri fyrireiking, sum tó eigur at byrja sum skjótast.

– Eitt tiltak, sum eg seti stórar vónir til, er sokallað vinnuhús í útoyggjum, har tað skal bera til at tilvirka ymiska brúkslist, men eisini mat við grund í tí tilfeingi og vitan, sum er á staðnum.

Óla Jákup úr Dímun sigur, at vinnuhús í stóran mun kunnu vera til at menna fíggjarliga grundarlagið hjá fólki í útoyggjum, men at myndugleikarnir eisini mugu hugsa um at skapa nútímans almenn arbeiðspláss í útoyggjum, sum nútímans samskiftishættirnir geva møguleika til.